# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800




## Politiska dagsskráin broytist

Politiska dagsskráin broytist sum valstríðið gongur. Hetta er einki nýtt og soleiðis hevur tað altíð verið. Tað, sum tó kann staðfestast er nakað nýtt, er, at tey bleytu virðini eru farin at fylla nógv meira á dagsskránni, enn flestu eygleiðarar høvdu roknað við. Hetta er áhugavert, tí hetta vísir fyri tað fyrsta, hvussu altjóðagerðin ávirkar alt, eisini evnini í einum føroyskum valstríði. Alt tað danska valstríðið snúi seg um bleyt virði og ein krákumánaða seinni fer føroyska valstríðið frá at snúgva seg um undirstøðukervi, búskaparmál, skatt og fiskivinnu til at snúgva seg um bleyt virði. At eitt føroyskt valstríð snýr seg um vælferð er ikki óvanligt. Men at útbúgving og mentan gerast høvuðsevni seinastu dagarnar fyri valið er bæði óvanligt og óvæntað.

Hetta, at útbúgving og mentan gerast høvuðsevni í valstríðnum, hóast politisku leiðslurnar ivaleyst høvdu ynskt sær onnur evni, er sera áhugavert. Hetta ber meira enn nakað annað prógv um, at Føroyar eru partur av altjóðagerðini og hetta er fyri tað annað dømi um, at veljarin vil hava eina øðrvísi dagsskrá. Nú eru so hesi evni komin upp, flokkarnir kýta seg við at koma við boðum uppá nýggjan útbúgvingar- og mentanarpolitikk. Spakuliga flyta vit okkum frá at tjakast um, hvar skúlar skulu standa til tann stóra spurningin: hvat skal innihaldið vera? Hvat skulu børn og ung nema sær av kunnleika til tess at kunna fóta sær í altjóðagjørdum heimi? Hvussu skulu førleikagevandi útbúgvingarnar skipast, um vit – t.v.s. ungdómurin, vinnan og samfelagið skulu kunna gerast kappingarfør í einum altjóðagjørdum heimi, har alt snýr seg um kapping?

Sama myndin er galdandi fyri mentanina. Eingin flokkur tóktist í byrjanini hava eitt boð uppá mentanarpolitikk í altjóðagerðini. Jú, løgmaður við síni frálíku Visjón 2015, men hana tóktust hann og flokkur hansara at hava gloymt alt um, tá valstríðið byrjaði. Nú er mentan eitt hitt heitasta evnið á valfundum, og veljararnir eru heilt opinbert sera áhugaðir í hesum evni. Hvat vilja flokkarnir? Hvussu vilja teir takla altjóðagerðina? Hava teir eitt mentanarpolitiskt boð uppá hesa ómetaligu avbjóðing? Næstu dagarnar fara vit ivaleyst at gerast eitt vet klókari. Samantikið kann staðfestast, at uttan mun til, hvør skipar samgongu sleppur hendan samgonga ikki undan at reka ein virknan, framskygdan og úrslitasøkjandi mentanarpolitikk. Her hava flokkarnir veruliga fingið nakað at hugsa um, og íblásturin finna teir ikki betri enn júst í Visjón 2015.

**Sosialurin**

# Tokutala í vetrarsól

SÍÐULINJAN
*Rigmor Dam*
*blaðfólk*



Nú eru bert fýra dagar, til krossurin skal setast, sum fær summi at korsa seg, tí nøkur verða krossfest. Valstríðið er um at koma í hæddirnar, men kortini eri eg meira ørkymlað enn nakrantíð.

Sakni at onkur kemur buldrandi inn á vøllin, lyftir nevan á loft og sigur sína hjartans meining um hetta landið, vit búgva í, og hvussu vit kundu gjørt alt so nógv nógv betur. Í løtuni er fullkomiliga ógjørligt at velja ein fram um annan, tí allir siga seg raðfesta alt: Vælferð, trivnað, útbúgving, gransking, tey veiku, tey fátøku, børnini, tey gomlu, bøndurnar... Men millum lítið og onki verður sagt um, hvørji mál ikki skulu raðfestast, hvat er nyttuleyst og ikki hevur uppiborið eina krónu úr landskassanum.

**Greiður ella gráur boðskapur**

Sakni sterkar flokkar, sum seta nøkur ultimatum, har teir gera púra greitt, at koma teir í samgongusamráðingar, hava hesi og hasi málini allar fremstu raðfesting, uttan nakað himpr. Marknaðarføring snýr seg um at bera ein greiðan og fangandi boðskap, sum fólk minnast, og tí ber ikki til bara at siga, at hetta ella hatta raðfesta vit eisini: Hvussu frammarlaga raðfesta tit tað? Hvørji øki skulu lúta og hvørji eru veruliga verd at kempa fyri?

**Hvar er passiónin?**

Líka sum at fólk, sum ikki dáma tónleik, ikki áttu at sloppið at arbeitt við børnum, áttu valevni ikki at komið sær at borið ein boðskap, sum tey ikki meina. Sakni at hoyra eitt valevni, sum veruliga tosar út frá hjartanum, tí viðkomandi bara ikki kann lata vera. Sum oftast biðja tey um orðið, tí okkurt mótstøðufólk akkurát hevur slept mikrofonini, og so má eg nokk eisini heldur siga okkurt um hatta.

Uttan at nevna nøvn, so er týðuligt, at summi valevni ikki sjálvi vita, leví tey eru uppstillað. Ongin passión, ongi genial ella kreativ hugskot, ongar veruliga logiskar grundgevingar fyri, hví tey eru so nógv betur egnað at umsita landsins tilfeingið enn tey, sum hava sitið við valdinum seinastu mongu árini. Stutt sagt: ongin vilji ella uppdrift og fullkomiliga onkisigandi hava tey ikki gjørt sær greitt, hvat ið tey vilja, hvussu ella hví. Og tað skínur so týðuliga ígjøgnum, tá ið tey lirra flosklar og klichéir oman yvir lesararnar ella áhoyrararnar: Fólkið er mentan og mentan er fólkið! Mentan er ikki ein útreiðsla, men ein íløga! Útbúgving er lykilin til framtíðina! Gransking, trivnaður og vælferð fyri øll! Mentanin skal vera hægri! Bullshitt!

Hvat ætlar tú ítøkiliga? Hvussu ætlar tú at føra hetta út í lívið? Hvar skal peningurin koma frá? Nær skal tað setast í verk?

**Kvinnur í landsstýrið**

Komandi landsstýrið verður helst skipað við øðrum fólkum enn fráfarandi. Longu áðrenn startskotið til valstríðið veruliga varð latið av, boðaðu nakrir flokkar frá, at teir fóru at taka atlit til javnstøðuna, gjørdust teir partar av einari komandi samgongu. Hetta var millum annað eftir áheitan frá fyrrverandi forkvinnuni í Javnstøðunevndini, Anniku W. Joensen. Eitt nú boðaði Tjóðveldi frá, at í landsstýri og øðrum álitissessum fer flokkurin at hava javna umboðan av monnum og kvinnum. Javnaðarflokkurin var eisini inni á nøkrum av tí sama, men við einari fiksari heilgardering. Tí flokkurin hevur meldað út, at tá landsstýrið skal mannast, hevur flokkurin samtykt, at ásetingin um javnstøðu eisini skal vera galdandi. So far so good. Og flokkurin greiðir frá, at hetta kann gerast við at flokkarnir, ið skipa samgongu, skulu skjóta ein persón av hvørjum kyni upp til hvønn landsstýrissess, ..og nú kemur tað spennandi.., tí flokkurin sigur víðari, at tað verður uppgáva løgmans at tryggja javnstøðu, tá ið landsstýri endaliga verður skipað. Sostatt kunnu hinir flokkarnir fáa kvinnuliga umboðan í landsstýrið, meðan hansara egni flokkur framvegis verður mannaður av - ja, monnum. Snilt, ósympatiskt og vónandi eisini ósannlíkt.

**Tá krossurin er settur**

Annars má sigast, at tað hevði verið stuttligt at vitað, hvørji málsøki flokkarnir ætla at krevja. Hvønn ráðharra fara teir at senda til hús? Skulu nøkur ráð býtast sundur, nøkur skerjast burtur, ella skulu vit hava fleiri? Og hvussu er ætlanin at bøta um umsitingina av ráðunum, so fleiri enn hálvir løgfrøðingar verða til hvørt ráði? Greið svar eru ikki at uppdríva frá flokkunum, tí teir skulu halda seg væl við hvønn annan. Prísurin er, at eg ikki áni, hvat eg fái fyri atkvøðuna.

**"Eg og bara eg"**

Aja - hetta bleiv ein síðulinja við nógvum spurningum og fáum svarum. Sigur kanska eitt sindur um, at hetta er fyrsta valstríðið, har flokkarnir veruliga eru skúgvaðir til viks av einum "eg og bara eg" hugburði hjá valevnunum. Tá er ikki løgið, at boðskapurin frá flokkunum og formonnunum er ógreiður.. og eg í villareiði!

P.S. Hvar bleiv visjónsætlanin forrestin av í valstríðnum?

**Á SÍÐULINJUNI gera blaðfólk á Sosialinum viðmerkingar í sambandi við løgtingsvalið**

## Ræting

Av misgávum kom ein grein skeivt fyri í blaðnum í gjár. Talan er um greinina "Sundalagið – eitt øki ímiðjuni", har vit hava skrivað, at hetta er eitt tíðindaskriv frá Javnaðarflokkinum. Tað er tað ikki. Hetta er ein grein frá einum av blaðfólkum okkara, og biða vit Javnaðarflokkin og lesarar okkara halda okkum til góðar.

**blaðstj.**


Sundalagið - eitt øki í miðju

## Tíðindaskriv

Fyri at rudda allan iva burtur, skal Javnaðarflokkurin gera greitt, at flokkurin fult og heilt stuðlar ætlanini at byggja ein nýggjan studentaskúla í Havn. Hvar skúlin skal liggja er hin vegin ein spurningur millum skúlaog byggimyndugleikan.

Á sama hátt stuðlar Javnaðarflokkurin ætlanina um at byggja Eftirskúla í Hvalba.

*Javnaðarflokkurin*

**Sosialurin**

Sosialurin
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

Lýsingar

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Støddir:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.